# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 28.09.2015*

**Bygdaráðsfundur  28.09.2015  kl.  16.30  til kl. 18.45**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhøli | |
| Hjástødd: | Jóhannus Danielsen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Niclas Davidsen | x |
| | Mortan Højgaard | x |
| | Jákup Olsen | x |
| | Súnfríð Jacobsen | x |
| | Marjun Gaardbo skrivari | x |

**Til viðgerðar:**

**Mál nr. 72/2015 Mentanarmál**

J.nr. 00.15.10-P20-1-15

**Málslýsing**

Aftaná eina tilgongd, har starvsfólk hjá Nes kommunu saman við ráðgeva hava arbeitt við at seta orð á virðisgrundarlag (virðir), tilverugrund (missión) og hugmynd (visión) fyri kommununa, hevur Nes kommuna nú sett orð á virðisgrundarlag, tilverðugrund og hugmynd:

**Virðisgrundarlagið**

*Virðini eru tey grundsjónarmið, sum Nes kommuna byggir á, og sum skapa tann hugburð, sum er grundarsteinurin undir øllum tí vit gera. Virðini eru hjartað í Nes kommunu.*

**•Trivnaður**

Kommunan er savnandi, vísir umsorgan og gevur møguleikar fyri tí einstaka  og familjuni at trívast, millum annað við at skapa karmar fyri frítíð og mentan.

**•Ábyrgd og álit**

Nes kommuna tekur ábyrgd. Saman við opinleika, góðum samskifti og dugnaskapi, skapa vit álit ímillum borgara og kommunu.

**•Menning**

Nes kommuna er ein framsøkin kommuna. Við atlitið til umhvørvi og náttúru, skapa vit bestu fyritreytir fyri vinnu-, frítíðar- og bústaðarmøguleikum.

**Tilverugrund**

*Tilverugrundin lýsir orsøkina, at vit eru til. Hví vit ikki kunnu verast fyri uttan. Hon sigur, hví vit gera tað, sum vit gera og er samstundis okkara lyfti til borgararnar.*

## Nes kommuna – ein kommuna fyri øll

**Hugmynd**

*Hugmyndin er okkara leiðarstjørna, sum vísir hvagar vit ætla okkum. Hon er okkara hægsta mál. Eitt mál, sum vit ikki neyðturviliga klára at fullføra, men sum vit stremba eftir, og harvið skapa góð úrslit.*

## Vit vilja skapa lív og ganga fremst

**Tilmælir**
Á fundi 19.08.2015 tekur Mentanarnevndin undir við "Virðisgrundarlagið, tilverugrund og hugmynd", sum arbeitt hevur verið við.

Á fundi 26.08.2015 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini.

Á fundi 23.09.2015 mælir Fíggjarnevndin til, at kunnað verður um virðisgrundarlagið, tilverugrundina og hugmyndina í faldaranum, sum í løtuni verður gjørdur um Nes kommunu.

**Avgerð**
Tilmælini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 73/2015 Fíggjarmál**
J.nr: 82.01.00 – G01-1-15
**Málslýsing**
Onnur viðgerð av eykajáttan til keyp av arbeiðshøll.

Fyrsta viðgerð um keyp av arbeiðshøll var á bygdaráðsfundi 31.08.2015.

Nes kommuna hevur síðani 1.06.2009 leiga arbeiðshøllina, úti á Heygum, frá Vestcon. Nes kommuna, hevur í leiguavtaluni, forkeypsrætt til ognina. Ætlanin frá byrjan var, at kommunan við tíðini keypti arbeiðshøllina.

Samb. avtaluni verður keypsprísurin restskuldin, sum P/F Vestcon hevur í bygninginum, sum pr. 8. juli 2015 er kr. 794.799. Við verandi rentustøði er tað ein fyrimunur hjá kommununi at keypa arbeiðshøllina.

**Tilmælir**
Á fundi 26.08.2015 mælir Fíggjarnevndin til, at keypa arbeiðshøllina, og at fíggingin verður við lántøku.

Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt á bygdaráðsfundi 31.08.2015.

Á fundi 23.09.2015 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við aðru viðgerð av kostnaðinum fyri arbeiðshøllina.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 74/2015 Vegamál**
J.nr.05.13.01-P20-1-15
**Málslýsing**
Onnur viðgerð um keyp av kansteinum og gongubreyt við Gaddavegin.

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 28.09.2015*

Fyrsta viðgerð um keyp av kansteinum og gongubreyt við Gaddavegin var á bygdaráðsfundi 31.08.2015.

Í fíggjarætlanini fyri 2015 samtykti bygdaráðið at seta pening av til ger av gongubreyt fram við Gaddavegnum.

Tekniski leiðarin hevur gjørt eina kostnaðarmeting av kantsteinum og gongubreyt fram við Gaddavegnum. Talan er um strekkið frá húsinum hjá Hans Arna Johannesen og inn til Haldur Vang. Strekkið er umleið 500 metrar, og umfatar 35 grundstykkir.

Í ovaru síðu á vegnum verður kantsteinur og 2 metrar breið gongubreyt. Í niðaru síðu verður bert kantsteinur og nakað av fyllu innanfyri, t.v.s. 1000 metrar av kantsteini fara til arbeiðið.

Arbeiðsætlan:
Nes kommuna keypir lím-kantsteinar, og ger arbeiðið og fyllir upp við 0-75 tilfari til gongubreyt og innkoyringar í niðaru síðu.

Arbeiðið við regulering av fínari tilfari, trumling, og asfaltering verður boðið út seinni.

Vegleiðandi kostnaður (meting):

| | |
|---|---|
| Arbeiðsløn | 135.000 |
| Tilfar, kantsteinar v.m. | 325.000 |
| Tilsamans uttan mvg | **460.000** |

**Tilmælir**
Á fundi 18.08.2015 mælir Tekniska nevnd til, at arbeiðið við at gera kantsteinar og gongubreyt á Gaddavegnum verður gjørt, men at arbeiðið við asfaltering verður tikið uppaftur seinri.

Á fundi 26.08.2015 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd.

Á stovninum vegir íløga eru kr. 260.000 tøkar, meðan kostnaðurin fyri keyp av tilfari er kr. 325.000, tískil verða kr. 65.000 fluttar frá stovninum vegir rakstur.

Harafturat verða kr. 135.000, sum er arbeiðsløn, fluttar frá stovninum vegir rakstur til stovnin vegir íløga.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndin vóru einmælt samtykt, við fyrstu viðgerð, á bygdaráðsfundi 31.08.2015.

**Tilmæli**
Á fundi 23.09.2015 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við aðru viðgerð av kostnaðinum fyri kantsteinar og gongubreyt á Gaddavegnum.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var eimælt samtykt.

**<u>Mál nr. 75/2015  Byggimál</u>**
<u>J.nr. 02.34.02-P20-4-15</u>
**Málslýsing**
Í skrivi 12.08.2015 søkir borgari um loyvi til at byggja ein tilbygning, á eystursíðuni á sethúsum sínum matr. nr. 761f, Tofta bygd, sum skal nýtast til vaskirúm og súkkluskúr.

**Tilmæli**
Á fundi 15.09.2015 mælir Tekniska nevnd til at geva borgaranum byggiloyvi til tilbygningin, og at bygt verður eftir hesum treytum:

- At bygt verður sambært galdandi byggireglugerð.
- At bygt verður sambært innsendu tekning dagf. 12.08.2015.
- At Tekniska deild verður boðsend áðrenn arbeiðið byrjar.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**<u>Mál nr. 76/2015 Byggimál</u>**
<u>J.nr. 02.34.02-P20-5-15</u>
**Málslýsing**
Í skrivi 08.09.2015 søkir borgari um loyvi til at byggja seyðhús sunnanfyri sethúsini, og økja um hjallin, sum er bygdur í sethúsini norðanfyri,  við at gera eitt vásarúm (bryggers) á matr. nr. 77, Nes bygd.

**Tilmæli**
Á fundi 15.09.2015 mælir Tekniska nevnd til at geva borgaranum byggiloyvi til seyðhús og vásarúm, eftir teimum vanligu treytinum.

- At bygt verður sambært galdandi byggireglugerð.
- At bygt verður sambært innsendu umsókn dagf. 08.09.2015.
- At Tekniska deild verður boðsend áðrenn arbeiðið byrjar.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**<u>Mál nr. 77/2015 Vegamál</u>**
<u>J.nr. 05.01.00-P20-2-15 – Gaddavegurin</u>
<u>J.nr. 05.01.00-P20-1-15 – Moldgoymslan</u>
**Málslýsing**
Tekniski leiðarin hevur biðið um tilboð uppá asfaltering av einum vegastubba norður frá Gaddavegnum. Økið er 600m² til víddar.

Tekniski leiðarin hevur eisini biðið um tilboð uppá asfaltering av íbindingini til felags moldgoymsluna hjá Nes- og Runavíkar kommunum. Økið er 100m² til víddar.

Samlað tilboð frá HJ Asfalt er áljóðandi kr. 215.000 uttan mvg, og frá EM Asfalt er samlaða tilboðið áljóðandi kr. 208.500 uttan mvg.

**Tilmælir**
Á fundi 15.09.2015 mælir Tekniska nevnd til at taka av samlaða tilboðnum frá EM Asfalt áljóðandi kr. 208.500 uttan mvg.

Á fundi 23.09.2015 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd, og at kostnaðurin fyri asfaltering av vegastubbanum við Gaddavegin, verður tikin av stovninum vegir, viðlíkahald av vegum og gøtum.

Kostnaðurin fyri asfaltering av íbindingini til moldgoymsluna, verður tikið av stovninum moldgoymslur.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 78/2015 Mentanarmál**
J.nr.00.05.03-G01-2-15
**Málslýsing**
1. Sunnudagur í atvent er 29. novembur 2015. Mentanarnevndin skal viðgerða nær jólatrøini skulu tendra, og hvør skal tala, syngja og spæla, og hvat kommunan skal bjóða til matna.

**Tilmæli**
Á fundi 16.09.2015 mælir Mentanarnevndin til at hava sama tal av trøum, og at tiltakið verður skipað soleiðis, at jólatrøini tendra leygardagin 28.11.2015 kl. 16.00, og tosa við Ova Brim, prest um, at flyta fram røðu.

Aftaná verða kakao og bollar at fáa í kirkjukjallarinum. Síðani verður konsert, í Fríðrikskirkjuni, við luttøku av lokalum sangkreftum.

Mentanarnevndin samskipar tiltakið.

**Avgerð**
Tilmælið frá Mentanarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 79/2015 Mentanarmál**
J. nr.00.05.03-G01-1-15
**Málslýsing**

Minningarhald teirra sjólátnu 1. novembur, sum er sunnudag, stundar til, og tí er neyðugt at biða prest ella annan halda røðuna við minnisvarðan.

**Tilmæli**
Á fundi 16.09.2015 mælir Mentanarnevndin til at hava minningarhaldið í Fríðrikskirkjuni, síðan verða kransar lagdir við minnisvarðan. Kommunan bjóðar kaffi o.a. í kirkjukjallaranum eftir minningarhaldið.

Mentanarnevndin samskipar tiltakið.

**Avgerð**
Tilmælið frá Mentanarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 80/2015 Trivnaðarmál**
J.nr. 16.21.08-P16-1-15
**Málslýsing**
Í skrivi 09.09.2015 søkir Tannlæknafelagið um stuðul áljóðandi kr. 4.000,-. Umsóknin er grundað á, at Heilsutrygd og Tannlæknafelagið hava gjørt nýggjan sáttmála um tannrøkt, og hevur tannlæknafelagið tikið stig til at gera eitt lýsingar tiltak, at varpa ljós á møguleikan hjá øllum undir 23 ár at fáa fría kanning.

Ynski hjá Tannlæknafelagnum er, at øll skulu fáa betri tenn.

Lýsingarnar, ið talan er um, skulu røkka út til tey 18-23 ára gomlu í øllum Føroyum og skal verða eitt heilsuligt tiltak.

**Tilmælir**
Á fundi 17.09.2015 mælir Trivnaðarnevndin frá at játta stuðul til lýsingarátakið. Mett verður at partarnir, sum var av, eiga at gjalda fyri átakið.

Á fundi 23.09.2015 tekur Fíggjarnevndini undir við tilmælinum frá Trivnaðarnevndini.

**Avgerð**
Tilmælini frá Trivnaðarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 81/2015 Trivnaðarmál**
J.nr. 16.06.20-G01-3-15
**Málslýsing**
Í skrivi 15.09.2015 søkir Barnagarðurin um 25 tímar um vikuna til barn við serligum tørvi

**Tilmælir**
Á fundi 17.09.2015 mælir Trivnaðarnevndin til at játta stuðul, 25 tímar um vikuna, til barn við serligum tørvi.

Á fundi 23.09.2015 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Trivnaðarnevndini, og at kostnaðurin verður tikin av stovninum børn við serligum tørvi.

**Avgerð**
Tilmælini frá Trivnaðarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 82/2015 Fíggjarmál**
J.nr. 00.32.10-S08.4.15
**Málslýsing**
Fyrsta viðgerð av eykajáttan til Skálafjarðarsamstarvið.

Økistænastan hjá Skálafjarðarsamstarvinum hevur nú gjørt fíggjarstøðuna upp á øðrum sinni í 2015.

Nýggj meting av fíggjarstøðuni er gjørd ultimo juli 2015. Metingin vísir eitt framskrivað hall, ímun til løgdu fíggjarætlanina fyri 2015, fyri restina av árinum á 3,8 mió. kr. Hetta umframt ta eykajáttan, ið varð latin í mai mánaða.

Upphæddin býtt á kommunurnar í samstarvinum er fyri Runavíkar kommunu 2.463 tkr., Sjóvar kommunu 675 tkr. og Nes kommunu 662 tkr.

**Tilmælir**
Á fundi 23.09.2015 mælir Fíggjarnevndin til at játta kr. 662.000 til Skálafjarðarsamstarvið, og at peningurin verður tikin av tøkum peningi.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 83/2015 Fíggjarmál**
J.nr.14.00.00-Ø09-3-15
**Málslýsing**
Fíggjarætlan fyri 2016, hjá Skálafjarðar Kommunala Sløkkiliði (SKS), er komin til ummælis hjá Nes kommunu. Gjaldið pr. Íbúgva er óbroytt ímun til undanfarna ár.

**Tilmællið**
Á fundi 23.09.2015 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við uppskotinum til fíggjarætlanina fyri 2016 hjá Skálafjarðar Kommunala Sløkkilið.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 28.09.2015*

**Mál nr. 85/2015 Fíggjarmál**

J.nr. 00.32.10-S08-9-15

**Málslýsing**

Ásetan av fíggjarkarmi fyri 2016 fyri Nes kommunu.

**Tilmæli**

Fíggjarnevndin mælir til at áseta fíggjarkarmin fyri 2016 soleiðis:

| | |
|---|---|
| Skattainntøkur | kr. 42.609.000 |
| Rakstrarútreiðslur | kr. 41.696.500 |
| Úrslit áðrenn avdrøg/íløgur | kr. 912.500 |

**Avgerð**

Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.